# kki fjórða statsveldið



*góð. Men fyri tað noyðast fjølmiðlafólk ikki at finna sparingarnar, sum tz var samdur í, at fjølmiðlar ikki eru eitt statsveldi. Men metti, at ølmiðlar hava sera stóra ávirkan, og alneyðugt er at tryggja sær, at teir*

### Georg Metz

Georg Metz lívbjargar sær sum fyrilestrarhaldari og rithøvundur. Harumframt skrivar hann klummir og leiðarar á danska tíðindablaðnum Information. Metz hevur drúgvar royndir úr fjølmiðlaheiminum, og hevur áður verið blaðstjóri á Information og redaktionschef á TV-avisen.

### Hans Engell

Hans Engell er ábyrgdarblaðstjóri á Ekstrablaðnum. Harumframt er hann vanligur viðmerkjari á sjónvarpsrásini DR2. Hans Engell fór eftir fleiri ár sum fjølmiðlafólk upp í politikk. Hann var m.a. ministari í Schlüther-stjórnini. Tá Poul Schlüther fór frá, gjørdist Engell floksformaður hjá Konservativa Fólkaflokkinum. Hann tyktist sum eitt gott boð til starvið sum forsætisráðhárri. Eitt kvøldið á veg heim í bili rendi Engell í fyllskapi á. Hann fór beint frá sum floksformaður, og skjótt eisini burturúr politikki.

fjølmiðlafólkini vóru undir formannsvalstríðnum.

Georg Metz segði, at eingin ivi er um, at útsjónd hevur nógv at siga, og at Stauning t. d. ongantíð hevði verið valdur nú á døgum.

## Seta dagsskránna

Ekstrablaðið, har Hans Engell er blaðstjóri, verður ofta ákært fyri at verða ov nærgangandi. Men Hans Engell var stoltur av, at blaðið seinasta árið hevur haft 40 forsíðir, sum hava sett dagsskránna, og skapt kjak. Hann nevndi dømið um ein borgarstjóra, sum hevði brúkt pening ætlaður teimum heimleysu til at ferðast saman við konuni fyri. Ekstrablaðið hevur harafturat júst vunnið eina rættarsak, aftan á at tey hava avdúkað, at reinleikakrøvini ikki vórðu hildin á donskum svínaslátursvirkjum.

Hans Engell segði, at orsøkin til, at teir megna at liva upp til krøvini um óheftan tíðindaflutning, og eru við til at seta dagsskránna er teirra fíggjarliga orka. Ekstrablaðið er tað danska tíðindablaðið, sum hevur stórst yvirskot. Hetta fíggjarliga rásarrúm tryggjar ímóti óneyðugum trýsti.

Hann vildi verða við, at Ekstrablaðið setti dagsskránna í so stóran mun, at sjálvt Georg Metz las blaðið av og á. Georg Metz segði, at hann lesur Ekstrablaðið hvønn dag. Men, at hann onkrar dagar, angrar, at hann ger tað.

## Okkurt frá kommununi

Georg Metz greiddi frá, tá hann var blaðstjóri á Information. Blaðið hevði 50 ára hátíðarhald, og hann var í Aalborg og helt røðu. Aftan á røðuna fór hann inn í eina kiosk og bað um Information. Tann ungi maðurin handan diskin sá heilt ørkymlaður út og spurdi, um tað var okkurt kommunan gav út? Information hevur ikki tí somu slagkraftina, sum Ekstrablaðið, men hevur alíkavæl týdning.

## Øssur berjist ímóti kapitalismuni

Øssur Winthereig spurdi, um privatar fjølmiðlafyritøkur høvdu nakran møguleika at vera objektivar, tí teir altíð skuldu vísa eitt yvirskot.

Hans Engell svaraði, at Øssur berjist móti kapitalismuni allastaðni, bæði í Føroyum og í Danmark. Men at man ikki kann tosa um bløð, sum verandi góð forrætning. Sjálvt tey bløðini sum vinna pening, vinna so lítið, at tað ikki er fíggjarliga nøktandi. Blaðútgáva er ringt business. Men bløð eru týdningarmikil fyri samfelagið, og tí gongur tað. Eingin nevnd fer at blanda seg í objektivitetin, tí hann er ov týdningarmikil.

Eyðun Andreassen spurdi, um Hans Engell og Georg Metz, hondina á hjartað, ongantíð høvdu tikið vinnulig atlit ella atlit til nevndarformannin, tá teir valdu tíðindaflutning. Hans Engell segði, at tað hevði hann ikki. Hetta varð lýsingadeildin av og á ónøgd við. Men hetta hevur eitt fíggjarliga sterkt blað ráð til. Nevndin hevði heldur ikki funnið upp á at blandað seg.

Georg Metz segði, at hann einaferð hevði havt ein nevndarformann, sum eisini var formaður í einum pensiónsfelag. Tá fegnaðist hann um, at hann ikki hevði fakliga kunnleikan til at skriva eina grein um pensiónskassar.

## Skeivur maður pedofilur

Ekstrablaðið tapir sambært Hans Engell ikki longur serliga nógvar rættarsakir, men sjálvandi henda feilir. Her er eitt tað ringasta dømið, tá Ekstrablaðið her fyri hevði skrivað um ein pedofilákærdan mann, og høvdu sett eina mynd av einum sjónvarpsverti, sum æt tað sama sum tann ákærdi á forsíðuna. Engell segði, at í sovorðnum førum er neyðugt at fara beint út at biða orsaka og seta umbering í blaðið. Sjónvarpsverturin varð sjálvandi bæði skakkur og illur, og tað var sjálvandi eisini væl skilligt.

## Manglandi sjálvkritikkur

Jóanes N. Dalsgaard spurdi, um fjølmiðlafólk ikki áttu at verða meira sjálvkritisk. Hann helt, at hvørja ferð onkur fanst at einum fjølmiðlafólki ella teirra arbeiðshátti, so fór antin fjølmiðlafólki ella onkur á miðlinum í bløðini við einum verjuskrivi.

Hans Engell segði, jú, tað er alneyðugt at fjølmiðlar eru sjálvkritiskir, og á Ekstrablaðnum verður ikki sett svar til lesarabrøv, sum eru kritisk ímóti blaðnum. Ikki uttan so, at manglandi svar tykist forhánisligt. Í mest møguligan mun skal kritikkarin fáa síðsta orð.

Hans Engell greiddi frá, at tvey fjølmiðlasamtøk eiga 90% av donsku tíðindabløðunum, og hetta er ein trupulleiki, tí sjálvt um bløðini í einum samtaki finnast at hvør øðrum, so er kritikkurin ongantíð ordiliga naskur.

## Manglandi fjølbroytni

Hans Engell helt, at tað er sera hugvekjandi, at øll tey størru donsku bløðini eru antin sosial liberal, ella borgarliga liberal. Hóast Javnaðarflokkurin enn er næststørsti flokkur í Danmark. Í ES málinum er enn løgnari, hóast helvtin av donsku veljarunum ætla sær at siga nei í ES atkvøðugreiðsluni, so viðmæla øll dagbløðini eitt ja.

Luitjen Apol spurdi, hvussu eitt óheft blað kundi viðmæla ja ella nei í eini ES atkvøðu. Hans Engell segði, at blaðið hevði meiningar, so tað var ikki óheft á tann hátt. Men hevði ikki skyldu til at siga ja ella nei, hetta var ein umhugsað avgerð, á hendan hátt var blaðið óheft.

## Hittust aftur

Hetta var fyrstu ferð, at Luitjen Apol og Hans Engell hittust síðan fyri 19 árum síðan, tá Luitjen Apol og onnur friðarfólk steðgaðu táverandi danska verjumálaráðharranum í at sleppa inn í Tinganes. Hans Engell segði, at hann mintist væl hendingina, og at táverandi løgmaður Atli Dam, hevði verið illa við av støðuni.

Tá hálvur annar tími var liðin var fyrsta trapputingið av.

Vit kunnu bara við spenningi bíða eftir næsta tingi.



